»Club 20« skift út við »Eclipse«:

Ein ferð í dreymaland

- Tá fólk fara í býin, skulu tey sleppa at uppliva nakað øðrvísi og veruleikafjart frá vanliga gerandisdegnum, og júst hesum hava vit lagt okkum eftir, sigur Elisa Heinesen, sum saman við tveimum designarum úr Onglandi hevur staðið fyri hølisbroytingunum í nýggja náttklubbanum Eclipse, sum næsta vikuskiftið letur upp í fyrrverandi Club 20 hølunum

- Náttklubbin Eclipse verður í øllum førum einki, føroyingar fyrr hava upplivað, og møguliga fer tað eisini at taka nakað av tíð, áðrenn íbúgvararnir her á landi fara at dáma staðið, sigur Elisa Heinesen (høgrumegin), sum her er avmyndað saman við ensku designarunum Sally Franklin og Justine Harrison í nýggja klubbanum Eclipse

NÁTTARLÍV
Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

Vikuskiftið 11-12. oktober opnar nýggjur náttklubbi í klubbagarðinum í Havn í teimum hølum, sum fyrr bóru heitið Club 20. Navnið at nýggja náttklubbanum er fint og fornemt Eclipse, og bert heitið gevur eina ábending um, at talan er um eitt øðrvísi umhvørvi enn tað eftirhondini útgingna og slitna Club 20.

Designarar úr Onglandi

Seinastu tíðina hava tríggir útbúnir designarar staðið fyri broytingunum í nýggja klubbanum. Føroyska Elisa Heinesen, sum er útbúgvin palldesignari við serligum atliti til ljós og ljóð, hevur saman við ensku designarunum Sally Franklin og Justine Harrison mynda hølini av nýggjum, og hava allar tríggjar tikið útbúgvingar sínar á sama universiteti í Onglandi. Tann eini enski designarin arbeiðir í løtuni sum DVD framleiðari, meðan hin er theaterdesignari.

- Vit hava hjálpt hvørji aðrari í ymsum verkætlanum fyrr, og supplera vit hvørja aðra við ymsum sjónarhornum og áskoðanum, sigur Elisa Heinesen, sum higartil er vælnøgd við útsjóndina í nýggja náttklubbanum. Sjálv hevur hon nýtt umleið ein mánað at tekna alt, og síðani er arbeiðsfólkið farið í holt við at broyta hølini eftir ynskjum Elisu Heinesens.

- Nú havi eg í seinastuni arbeitt við klæðum burturav, so hetta við palldesigni er ein ferð aftur í tíðina fyri meg, sigur Elisa Heinesen flennandi.

Veruleikafjarur stemningur

Elisa Heinesen hevur sínar avgjørdu metingar um, hvussu ein uppliving í býnum skal vera.

- Tá fólk fara í býin, skulu tey uppliva eina órealistiska og øðrvísi uppliving samanborið við vanliga gerandisdagin, og júst hetta hava vit lagt okkum eftir í designinum av nýggja náttklubbanum, vísir Elisa Heinesen á. Við ljósi, ljóði og litum skal sambært henni eitt ávíst »mood« skapast, og skal talan á henda hátt vera um eina ferð inn í nakað dreymakent.

- Náttklubbin Eclipse verður í øllum førum einki, føroyingar fyrr hava upplivað, og møguliga fer tað eisini at taka nakað av tíð, áðrenn íbúgvararnir her á landi fara at dáma staðið, sigur Elisa Heinesen flennandi. Hon leggur dent á, at tær tríggjar í øllum førum hava roynt at skapa nakað ótraditionelt í hølunum niðri í klubbagarðinum.

Elisa Heinesen og hinar báðar úr Onglandi ferðast nógv í arbeiðsørindum, og hava tær tískil sæð og upplivað nógvar ymsar náttklubbar kring heimin. Umframt tað hevur føroyski designarin í sambandi við hesa verkætlan verið og hugt at ymsum náttklubbum uttanlanda til íblástur at forma Eclipse.

- At hava verið ymsastaðni og hugt hevur givið íblástur til hesa verkætlan, og fleiri hugskot eru fingin um, hvussu tað skal síggja út inni í Eclipse, sigur Elisa Heinesen. Sostatt kann sambært henni ein altjóða dámur eisini væntast í nýggja klubbanum.

21 ára aldursmark

Sambært eigaranum Peturi Olsen er málbólkurin hesaferð heilt nýggjur, og leggur Petur Olsen dent á, at í Eclipse verður aldursmarkið strangt 21 ár. Við gamla Club 20 konseptinum gjørdust tey ungu millum 18 og 21 ár ov fá til náttklubba í Havn, tá so nógv onnur tiltøk eru.

- Taka vit allar festivalarnar, stevnurnar, konsertirnar, prixini og onnur tiltøk, t.d. tiltøkinin hjá ítróttarfeløgunum, verða so fáir kundar eftir í hesum aldrinum, og tískil stíla vit eftir nøkrum øðrvísi nú, vísir Petur Olsen á.

Sostatt verður væntandi talan um nýggja fjøld í endurnýggjaðum hølum við nýggjum navni, og eigarin leggur eina við, at fólk, sum ætla sær í býin í næstum, av sonnum kunnu vænta sær nakað øðrvísi.

- Í løtuni kunnu vit bert siga, at klubbin verður nakað, ein ongantíð fyrr hevur sæð her á landi, vísir Petur Olsen á uttan at vilja avdúka, hvør kostnaðurin fyri renoveringarnar hevur verið.

Teir tríggir designararnir leggja í hesum døgum seinastu hondina saman við arbeiðsfólkunum á verkið, sum skal vera til reiðar at hýsa gestum fyri fyrstu ferð komandi vikuskiftið, og sambært Elisu Heinesen er endamálið við Eclipse at geva fólki møguleikan fyri eini ferð inn í dreymaland í eini øðrvísi náttaruppliving samanborið við tað, føroyingar eru vanir við.

Arbeiðið er uppá tað harðasta í hesum døgum, so nýggi náttklubbin Eclipse verður til reiðar komandi vikuskiftið

- Tit umboða styrki og góðu virðini

Patrick DeNeergaard, nýggjur prestur í Vági, hevur virðing fyri t.d. skotum, føroyingum og íslendingum, tí í hesum fólkum býr styrki, guðsótti og tey góðu virðini. Nýggi presturin er fallin væl til í nýggja umhvørvinum. Maðurin, sum er fødur í Irak og uppvaksin í Arabisku Emiratunum, men sum við kristnu foreldrum sínum flutti til Danmarkar sum 16 ára gamal, savnar frímerki og myntir og honum dámar at íðka ítrótt og at lesa

Patrick DeNeergard uttanfyri prestagarðin í Vági
(Mynd: D. Olsen)

KIRKJULÍV
Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Vit hitta nýggja prestin í Vági, eftir at hann hevur verið nakað yvir eina viku í starvinum.

Tað tykist, sum alt er á leið, sum nýggi presturin í Vági hevði hugsað sær. Hann kennir seg vælkomnan og er glaður fyri hjartaligu móttøkuna, hann hevur fingið.

- Eg havi verið sera væl móttikin. Fólk tykjast áhugað og eru vinarlig og blíð. Eg kenni meg næstan sum part av eini familju og vónirnar hava víst seg at samsvara við veruleikan, sigur Patrick DeNeergaard, ið eisini fegnast um góðu móttøkuna frá kirkjumyndugleikunum, bispi og dómprávsti.

- Eg havi stóra virðing fyri fólki, ið búgva slík stað sum í Skotlandi, Íslandi og í Føroyum. Tað er hørð náttúra. Tit eru hørð, men hava góð virðir, styrki og guðsótta og hetta boðar frá góðsku, metir Patrick DeNeergaard.

Avbjóðing

Um orsøkina til, at hann søkti starvið sum prestur í Føroyum, enntá í útjaðaranum, sigur Patrick, at hetta var ein avbjóðing og at honum dámar avbjóðingar. Og so er líkamikið, hvørt tað er í býnum ella á bygd.

- Uppgávan er at boða evangeliið. Og tað sum telur er, hvussu fólk eru, sigur Patrick, og sipar til, at hvar tey eru stødd hevur minni at siga.

- Føroyingar eru fitt fólk, sigur Patrick.

Sjálvur kemur 35 ára gamli Patrick úr Árhus, har hann eisini hevur lisið guðfroði.

Men hann metir so avgjørt ikki, at so stórur munur er á at koma til Føroya.

- Føroyingar hugsa sum tey gera í Jútlandi, og tað er ein góður eginleiki, sigur Patrick við einum farra av skemti,

- Tað snýr seg um at vera til hjálpar, har tað er neyðugt, og tað snýr seg um at vera fólkaligur, men samstundis eru hesi fólk nakrar harðar bananir, tá á stendur, hugleiðir Patrick.

Littur

Patrick er føddur í Irak og uppvaksin í Arabisku Emiratunum. Sum 16 ára gamal kom hann til Danmarkar. Mamman og pápin eru kristin.

- Tað eru mong sløg av kristnum fólki í Irak. Mamma er katólsk, pápi hennara er hálvur indari og hálvur onglendingur og er av Conway familjuni, ið er stór familja.

Uppá spurningin, hvørt Patrick hevur kent á egnum kroppi, at á okkara leiðum eru fólk, ið ikki uttan víðari góðtaka fólk við dimmum holdi ella øðrvísi hugsandi, sigur hann, at tað kann hann ikki beinleiðis siga.

- Flestu innflytarar eru muslimar og eru lættir at fáa eygað á, eru lættir at kenna á eittnú teirra klædnapløggum, men tað eru mangir, ið ikki eru muslimar, minnir Patrick á, men hann ásannar, at flestu fólk við dimmum holdi vera skjótt flokkað sum metir Patrick.

Spurdur, um hann metir seg sum talara, ið kann fanga eina fjøld, sigur nýggi presturin í Vági:

- Tað er ikki so nógv tað, ið eg geri, men Heilagi Andin arbeiðir við sínum mátti. Eg skal bara boða gleðiboðskapin so einfalt og skilligt, sum tilber.

Saknar styrkivenjing og cafélív

At Patrick kemur úr býumhvørvi, Árhus, ger sjálvsagt, at hann hevur merkt sær, at á bygd eru ikki somu frítíðartilboð, sum á størri plássum.

- Í míni frítíð havi eg háhuga í frímerkjum og myntum, men eri eisini ítróttarhugaður, har renning, súkkling og styrkivenjing liggja frammaliga, so sjálvandi er saknur t.d. í eini styrkivenjingarmiðstað. Men mær dámar eisini at ganga túrar í náttúrini og at gera mat og at lesa. At fara á café dámar mær eisini, so eisini har er kanska okkurt, ið saknur er í, sigur Patrick, sum tó trívist væl og sum gleðir seg at fáa vitjan av vinfólki.

Mamman hevur ikki góða heilsu, so óvist er um hon kemur hendaveg at vitja, men vinfólkini hava boðað frá, at tey koma at vitja, greiðir Patrick frá, og letur okkum vita, at hann visti um Føroyar, áðrenn hann kom til landið, at tað er líkt Skotlandi, at her er seyður og at írskir munkar vóru her í gamlari tíð at at landið var partur av víkingatíðini.

Patrick metir, at hansara fjøltáttaða bakgrund gevur honum ein betri førleika at skilja ymisk fólk.

Og at hann eisini var ST-soldátur á Cypern gav eisini innlit í hvussu fólk eru.

- Har er land, ið er skilt sundur og fólk, ið ynskja at verða sundurskilt og tey, ið ynskja felagsskap, so har er spenningur í, sigur Patrick.

Heilagi andin talar

Um sína støðu í prestastarvinum sigur Patrick De Neergaard.

- Eg eri ikki fundamentalistur, men hinvegin merkir tað ikki, at alt er loyvt. Eg komi við opnum sinni og vil fegin hitta fólk, sum tey eru.

At sunnara prestagjald í Suðuroynni ofta hevur borið orð fyri at hava fleiri jarðarferðir, enn t.d. dópar ella brúdleyp, ræðir ikki nýggja prestin.

- Hetta er ein partur tænastuni í starvinum, men sjálvandi er størri gleði í dópi og brúdleypi, tí tá er tekin um fólk, ið koma aftur at seta búgv og um fólkavøkstur, sigur Patrick, sum er farin undir at læra seg føroyskt, so hann fer at skilja málið. Hann er byrjaður við at lesa í sálmabókini og honum dámar stak væl, tá føroyingar syngja.

- Tit syngja so hjartaliga og málið er gjørt til sang,